# Norskur tjóðardagur men høvuðspersónurin vantar

**– Tá kongur okkara, Harald ikki megnar at koma fram á balkongina, og tað sjálvan 17. mai, tá er hann sjúkur, sigur norskfødda havnarkvinnan, Ellen-Margrethe Nolsøe, sum í ár heldur tjóðardagin saman við norskari vinkonu**

TJÓÐARDAGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Norðmenn:** – Hvis kongen ikke er med i dag… ja, da er han for alvor syk!

Tað er við sorgblídni, at 64 ára gamla Ellen-Margrethe Nolsøe kann staðfesta, at í øllum tiltøkunum á tjóðardegi Noregs, so vantar høvuðspersónurin: Kong Harald.

Vit sita inni í eini hugnaligari stovu í Áargeil í Havn. Eitt vanligt føroyskt heim, men sum í gjár var fullkomuliga broytt longu frá morgunstundini av.

Í stovuni er sjónvarpið koyrt eyka hart frá. Tað hevur fingið heiðurpláss á miðjum gólvi. Á borðinum standa kaffikoppar og tallerkar og tær góðu køkurnar, sum húsmóðurin setur fram fyri okkum. Skjótt kemur kaffi og the eisini.

Í stovuni síggjast ein hópur av myndum úr Noregi, og sum minna okkum á, at vit eru í einum heimi, har norðmenn búgva. I dagens anledning eru fleiri norsk fløgg at síggja.

Og hví skuldu tey ikki eisini tað? Orsøkin til alt hetta hóvastákið er hin einfalda, at 17. mai jú er tjóðardagur Noregs.

Ert tú norðmaður í Noregi, er hetta ein sera stórur dagur. Ert tú norðmaður úti í heimi, so er hetta somuleiðis ein stórur dagur.

Og ert tú norðmaður í Føroyum, so er hetta eisini ein dagur, sum ikki fer aftur við borðinum, uttan at dagurin skal markerast.



*Tær tríggjar norsku kvinnurnar – vinstrumegin frá: Tone Kjeld, Ruth Kjeld og Ellen-Margrethe Nolsøe - eru í góðum lagi, nú 17. mai aftur er á skránni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### – Tá er hann sjúkur

Tað var júst hetta tey vóru í ferð við í hugnaligu stovuni í Áargeil 2 í Havn.

Sjónvarpið var sett á NRK1, har tey kundu fylgja við øllum tí sum hendir í heimlandinum Norge.

– Se. Se der. Nå kommer de frem på balkongen. Sonja, Håkon Magnus og Mette Marit. Så vakre de er… Åh nei, ser dere – kongen mangler. Han er ikke med!, staðfestir Ellen-Margrethe.

Tað er øllum greitt, at Harald kongur er rættiliga sjúkur av krabbameini. Ikki er long tíð síðani hann varð skurðviðgjørdur fyri hesa sjúkuna, og í løtuni er hann sjúkrameldaður.

Líkt er til, at støðan ikki er alt ov góð beint nú, tá hann ikki megnar at standa frammanfyri stóru mannfjøldini við slottið í norska høvuðsstaðnum sjálvan tjóðardagin.

### Góður stemningur

Ellen-Margrethe var fyrrapartin í gjár farin á vitjan hjá eini aðrari norskari konu, teirri væl eldru Ruth Kjeld.

Tær eru ikki í Noregi til henda dagin, men tað forðar teimum ikki í at halda henda dagin saman. Tær fáa tó við sær allan stemningin úr Noregi, tí norska sjónvarpið ger nógv burturúr ein slíkan dag.

Við upptøkutólunum eru teir farnir kring alt landið fyri at vísa, hvat fólk gera burtur úr í Noregi og í øðrum londum, – og eisini í Føroyum.

Hetta kemur sera væl við hjá norðmonnum, sum staddir eru í øðrum londum.

Um kvøldið gleða tær seg til at fara til 17. mai-dags hald í einum heimi í Kollafirði saman við øðrum landsmonnum sínum. Har verða helst einir 45 norðmenn, sum eru búsitandi í Føroyum, og sum fara at seta hvørjum øðrum stevnu til eitt hugnaligt 17. maidags-kvøld.

# - 17. mai merkir tað sama sum friður

**– Uttanfyri fóru øll fløggini á fulla stong. Tí fyri okkum og okkara land merkti tað, at nú var friður í landinum. Jú, hetta var eisini ein minniligur dagur, sigur Ellen-Margrethe**

TJÓÐARDAGUR
*Snorri Brend*

**Havn:** – Jú, hetta er ein serstakur dagur í ár. Ein dagur har vit minnast at 100 ár eru liðin síðani vit gjørdust leys av Svøríki.

– Og so mugu vit ikki gloyma, at tað eisini eru liðin 60 ár síðani at Noreg varð leyst av seinna heimsbardaga. Hetta er ein »fantastisk festdag«, sigur Ellen-Margrethe.

Ellen-Margrethe varð borin í heim í Oslo í august mánaði 1940, – tað árið tá Noreg av álvara kom við í seinna heimsbardaga.

Hon er í teirri sjáldsomu støðuni, at hon minnist rættiliga nógv frá tíðini undir seinna heimsbardaga. Orsøkin til hetta er uttan iva hon, at tey í hennara familju vóru sera politiskt áhugað, har m.a. abbi hennara var ein kendur politikkari.

Hon minnist tí sera væl, tann dagin í 1945, tá ein onkul hennara bað tey øll um fara út á altanina: »Um ein tíma verður almannakunngjørt, at Noreg er vorðið frælst aftur!«

– Uttanfyri fóru øll fløggini á fulla stong. Tí fyri okkum og okkara land merkti tað, at nú var friður í landinum. Jú, hetta var eisini ein minniligur dagur, sigur Ellen-Margrethe.

Av tí at so stutt var fráliðið frá krígsenda, var ikki gjørt so nógv burtur úr hátíðarhaldinum hetta árið. Men kortini var eingin norðmaður í iva um, at høvuðsorðið henda dagin var »FRIÐUR«.

Árið eftir var gjørt nógv meiri burturúr, minnist hon, og síðani tá hevur 17. mai altíð verið ein serstakur dagur í lívi hennara.

### Gloymdu ov skjótt

Tann 17. mai 1946 stendur somuleiðis klárur í minninum hjá Ellen-Margrethe.

Hetta var ein ótrúligur festdagur, hóast tað oysregnaði. Hon minnist, at hon sat á fanginum hjá pápa sínum alla tíðina.

Fólk í hópatali vóru samankomin til dagin. Hetta minnist hon væl, men so fer hon ongatíð at gloyma eina heilt aðra sjón, sum festi seg í minni hennara:

– Tað var tá, at eg sá hesar hvítu bussarnar við krígs-invalidunum í. Frammanfyri bussarnar sóust rullistólar og enntá onkur song. Hóast eg bert var seks ára gomul tá, so hava hesir hvítu bussarnir altíð staðið rimmar fast í minni mínum.

– Í bussunum sótu invalidar frá seinna heimsbardaga. Hesir menn, sum høvdu stríðst fyri okkara land, vóru nú komnir saman við øllum fólkinum fyri at hátíðarhalda frælsið og tjóðardagin.

– Øll vóru vit fegin saman við teimum. Men eg haldi kortini, at teir vórðu alt, alt ov skjótt gloymdir - hesir menninir, sum høvdu gjørt ein so stóran innsats fyri okkara land, sigur hon.

- - Eg var seks ár, og var so mikið stór at eg skilti alt tað, sum teir høvdu verið ígjøgnum í hesum stríðnum. Og eg var so følsom, at eg hevði bestan hugin at gráta yvir alt tað, teir høvdu verið ígjøgnum.

### Kongurin er eingin abbi

Frammi við slottið hevur tó altíð verið staðið, har mest varð gjørt burtur úr tjóðardegnum.

Ellen-Margrethe minnist somuleiðis eina aðra hending frá einum tjóðardegi frammanfyri slottið.

Sum vanligt er, so kom tann kongaliga familjan fram á balkongina, fyri at heilsa uppá tey túsundtals fólkini, sum har vórðu savnað saman. Í sambandi við hetta kom eisini abbi hennara, ið var kendur politikkari, eitt skifti fram á balkongina.

Hóast Ellen-Margrethe var lítil tá, so minnist hon, at tá hon sá abban, so gjørdist hon sera glað. Ja, so glað at hon, við sínu sterku barnarødd skar í eitt róp: ABBI!

– Og tú kanst líka trúgva, at fólk vendu sær ímóti mær. Tað var, sum um tey vildu siga við meg, at eg skuldi bara váða mær at kalla sjálvan kongin fyri ein abba. Tað var at spotta kongin.

– Men tey vistu sjálvandi ikki, at abbi mín var ein teirra, sum stóð har frammi á balkongini, sigur hon og kann ikki annað enn smílast at tilburðinum.

### Løgin tjóðardagur

Í 1973 flutti Ellen-Margrethe til Føroyar, saman við manni sínum, Mortan Nolsøe, sum var við til at leggja lunnar undir virksemið á Debesartrøð.

Hóast Mortan var føroyingur, so helt hann altíð frí henda serstaka dagin. Og Ellen-Margrethe minnist enn fyrstu ferð, tey skuldu halda tjóðardag Noregs í Føroyum.

– Vit høvdu planlagt ein serstakan dag. Men so gjørdist ikki: Tað eina barnið datt í eina tjørn, og hitt barnið máttu vit leita leingi eftir, tí tað varð blivið burtur, sigur hon.

Hóast árini eru vorðin 65, so er hetta kortini ein dagur, sum verður hildin í hennara heimi. Hon roynir tí eisini, at minna eftirkomarar sína á tann týdningin, sum hesin dagurin hevur fyri hana og norska fólkið.

– Jo, dette er en spesiell dag. En dag hvor vi alle har en fantastisk fest.